gult cyan magenta svart



## DAGSINS MEINING

# Bara útlendsk lúsin er…

Eini 60 býráðslimir eru í hesi vikuni á skeiði í Danmark, hvussu kommunalpolitikkur skal rekast í teimum føroysku býunum. Hetta er óivað gagnligt fyri teir persónliga, og hetta verður vónandi til frama fyri føroysku býirnar, so býráðspolitikkurin verður meiri professionellur.

Summir býir eru væl riknir, men aðrir hava minni hepna stýring. Men tað miðvísa arbeiðið, sum er gjørt seinastu árini, hevur verið ein bati, og harafturat eru flest allir býráðslimir tilvitandi um, at tað ber ikki til at læna sega úr trupulleikunum. Skuldin skal gjaldast aftur.

Hetta setir krøv um, at eitt langt sikti er í politikkinum, at hann er væl tilrættalagdur, so tað slepst undan tilvildarligum loysnum, sum verða tiknar í skundi. Harafturat mugu vit vóna, at vit sleppa undan tí vina- og kenningarpolitikki, sum er eyðkendur í summum býum. Heldur ikki í høvuðstaðnum, har hann einaferð fekk heitið »smákorruption í stórum stíli«!

Samanumtikið eitt frálíkt tiltak. Men. Og tað er eitt stórt men. – Hví er neyðugt at senda 60 kommunupolitikkarar niður á tann danska kommunala háskúlan? Hevði ikki borið til at fingið nakrar lærarar til Føroya og hildið skeið á einum hotelli ella gistingarhúsi í Føroyum, sum gapa tóm á hesi ársins tíð?

Tað verður so nógv tosað um at byggja upp eina ferðavinnu. M. a. roynir ferðavinnan at fáa felagsskapir og fyritøkur at halda ráðstevnur og skeið uttan fyri háárstíð, so gistingarhúsvinnan fær størri inntøkur. Hetta er eisini eydnast í ávíst mát. Spurningurin er tí, hví kommunusamskipanin ikki heldur leggur eina hálva millión krónur í føroysku gistingarhúsvinnuna enn at leggja hana í Danmark. Óivað hevði skeiðið eisini verið bíligari.

Vónandi er skeiðið bíligari í skattaprosentum enn kavaruddingin í Havn.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Stórt gospeltiltak í Norðurlandahúsinum

Jessy Dixon saman við Siloakórinum,Vox og United Voices verður í Norðlandahúsinum 24. februar 2001

Heimskendi gospelsangarin, Jessy Dixon, kemur til Føroyar at hava konsert í Norðlandahúsinum 24. februar.

Dixon hevur sín egna klaverspælara við, sum saman við evnaríkum føroyskum tónleikarum koma at spæla við honum á konsertini.

Saman við Dixon kemur eitt stórt kór uppá um 80 fólk at syngja. Tað eru tey 3 kendastu rytmisku gospelkórini í Føroyum, Siloakórið, Vox og United Voices, sum eru saman um tiltakið.

Jessy Dixon er heimskendur »Black American Gospel« sangari. Jessy er ein slóbrótari, tá tað kemur til at blanda Black Gospel við populeran kristnan tónleik.

Við sínum mongu konsertum gjøgnum Amerika, Evropa, Afrika, v.m. hevur hann ognað sær tittilin sum »the King of Gospel"«

Dixon hevur arbeitt saman við mongum kendum artistum, eitt nú Paul Simon, Diana Ross, Randy Crawford, Ardrae Crouch v. m.

Í Føroyum er Dixon nok mest kendur frá videobondunum við Bill og Gloria Gater, har hann syngur saman við øðrum kendum gospelsangarum.



*Heimsgitni gospelsangarin, Jessy Dixon, hevur konsert í Norðurlandahúsinumk næsta leygardag*

Dixon hevur givið út ein hóp av fløgum, sum hava givið honum fleiri gullplátur og Grammy nominatiónir.

Dixon skrivar sjálvur ein stóran part av tí, hann framførir. Hansara sangir verða eisini nógv brúktir av øðrum, og hann hevur eisini skrivað fleiri løg til aðrar kendar sangarar.

Millum sangirnir sum Dixon hevur skrivað eru "I Love To Praise His Name," "He's The Best Thing… To Happen To Me," "The Wicked Shall Cease Their Troubling," "He Has Done Great Things For Me," "I Know What Prayer Can Do," The Day You Set Me Free," "There is No Failure In God," "We Give You Praise," "You Bring The Sun Out," "The Failure Is Not In God It's In Me," "Give God The Glory," "I'll Be Alright," "I Expect To See Him," "Hold On A Little While Longer," "I'm Satisfied," "It's Alright Now," etc.

Meir kann lesast um Jessy Dixon á heimasíðu hansara http://www.jessydixon.com

Siloakórið kemur, sum navnið eisini sigur, úr Siloa í Fuglafjørði. Kórið er samansett við fólki úr brøðrasamkomuni ymsastaðni í Eysturoynni. Kórið er undir leiðslu av Eyðun av Lakjuni.

Gospelkórið VOX heldur til í Meinigheitshúsinum á Glyvrum. Tað eru ungfólk úr heimamisjónini í Eysturoynni sum manna kórið. Kórleiðari hjá VOX er Ásbjørn Berthelsen av Strondum.

United Voices er eitt tvørkirkjuligt gospelkór, við luttakarum úr øllum landinum. Kórið er undir leiðslu av Eiriki Skála av Argjum.

## Tøkk

Vit siga hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma, langomma og systir okkara

**Margretha S. Sigurðsson**

andaðist og varð jarðað.

Takk fyri kransar, blómur og minnisgávur til Norðoya Røktarheim, har starvsfólkini fáa eina serstaka tøkk fyri alt. Takk til prest og hvønn einstakan, sum fylgdi henni – eisini tað seinasta strekkið

**Børnini**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá ið okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Olivia Petersen (fødd Beder)**

doyði og varð jarðað

Ein serlig tøkk til starvsfólkið á Suðuroyar Sjúkrahúsi, Heimahjálpina , og starvsfólkið á Eldarasambýlinum í Vági. Takk fyri, at tit vóru so góð við hana, og ansaðu henni til tað seinasta.

Ein hjartans tøkk til prest, dekn, klokkara, gravara og til kirkjukórið Ljóm. Eisini takka vit øllum, sum við gávum, kransum, blómum mintust hana, og tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstaðð.

*Fyri tey avvarðandi*
**Gunnbjørn, Ingibjørg, Poul og Egil v/fam.**


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.






gult cyan magenta svart